

## Keypa á netinum

Í einari danskari kanning siga 36 prosent av teimum spurdu, at tey hava keypt vørur ígjøgnum internetið, og umleið ein fjórðingur siga seg hava keypt ígjøgnum útlendskar heimasíður og goldið við gjaldskorti. Upplýsingarnar eru úr einari nýggjari kanning, sum Brúkararáðið hevur gjørt, og danska hagstovan sigur, at tølini samsvara væl við teirra hagtøl. Sum skilst er tað serliga prísurin, sum fær danir at keypa á internetinum.

## Ikki nettoløn

Undir einum orðaskifti í norska Stórtinginum í síðstu viku vildu andstøðuflokkarnir hava at vita, um stjórnin hevur nakrar ætlanir um at gera eina nettolønarskipan fyri fiskiflotan fyri at tryggja skipum og bátum manning. Men tað ætlar stjórnin ikki. Helga Pedersen, fiskimálaráðharri, segði, at nettoløn skal brúkast, tá altjóða kapping ger tað neyðugt fyri at varðveita kappingarførið, og norska fiskivinnan er ikki í slíkari støðu, segði hon.

# Group

*ST er sum sæst á yvirlitinum ikki bert sjálvur ST-felagsskapurin. Talan er eisini um eina røð av sonevndum serfelagsskapum. Talan er t.d. um IMO, sum Føroyar eru atlimir í, IAEA sum varar av kjarnorku og heimshandilsfelagsskapin WTO. Í hesum serfelagsskapum finna vit eisini sonevndu World Bank Group.*




serstovnar á hesum økjum í sonevndu ST familjuni: Her verður serliga hugsað um World Bank Group, IMF og WTO. Stutt lýsing av einstøku felagsskapirnir sæst aðra staðni á síðuni..

World Bank Group, ella tað sum í vanligari talu verður nevnt Heimsbankin fæst serliga við at menna menningarlond, men eisini við at fylgja við í hvat fyriferst kring heimin. Tí verður stórur dentur lagdur á frágreiðingar, sum meta um støðuna og hvørji inntriv eru hóskandi. Núverandi forsetin í World Bank Group, Paul Wolfowitz hevur eisini verið nógv frammi í fjølmiðlunum og soleiðis verið við til at sett Heimsbankan á dagsskrá. Heimsbankin og IMF hava annars verið ákærd fyri at vera longdi armurin hjá vesturheiminum – og serliga USA - undir kalda krígnum og soleiðis stuðla liberalum pørtum í triðjaheimslondum.

Heimsbankin leggur serliga dent á at menna triðjaheimslond, men er ein týdningarmikil leikari tá talan er um metingar og rák í heimsbúskapinum, bæði mett undir einum, regionalt og í einstøki londunum. Heimsbankin hevur ein umfatandi databasa, sum kann brúkast til metingar av ymsum slagi.

### Stóran týdning

Sigast kann at Heimsbankin sum stovnur hevur stóran týdning í arbeiðnum at menna fátækaru londini. Tað verður bæði gjørt við krøvum fyri at læta lán ella annað slag av figging. Men eisini á arbeiðnum at seta krøv til ríkaru og sterkaru londini. Tí skulu vit eisini síggja World Bank Group, IMF og WTO sum stovnar ið hava hvør sín part í tilgongdini at hava frælsari marknaðir og at menna fátæk lond. Hesir stovnar eru kjarnin í einum meira umfatandi búskaparligum samstarvi kring heimin, sum umvegis samstarv og menning av fátæku londunum skal verða við til at skapa ein rættvísari og tryggari heim.

## FAKTA

**Stovnar í ST familjuni sum arbeiða beinleiðis við búskapi, fígging og handli.**

**World Bank Group**

IBRD, International Bank for Reconstruction and Development

Arbeiðir við at menna miðalfátæk lond, IDA, International Development Assocation arbeiðir við teim fátækstu londunum. Amboð eru millum annað lagalig lán og kredittir. Serligur dentur verður lagdur á útbúgving, heilsu, samskifti og infrastruktur.

IFC, International Finance Corporation, er privat sektor armurin hjá World Bank Group og leggur seg serliga eftir at menna privata geiran í menningarlondum

MIGA, Multilateral Investment Guarantee Agency. Høvuðsendamálið hjá MIGA er at fáa útlendskar íløgur í menningarlond.

ICSID, International Center for Settlement of Investment Disputes. Høvuðsendamálið er at hava ein stovn, sum kann taka sær av ósemjum millum lond og privatar útlendskar íleggjarar.

**IMF**

International Monetary Fund, hevur trý høvuðsøkir. IMF eygleiðir støðuna kring heimin; IMF kann læna londum pening og IMF kann veita londum serkunnleika

**WTO**

World Trade Organization, er einasti heimsumfevnandi felagsskapurin sum arbeiðir við handli ímillum lond, soleiðis at hetta verður í skipaðum kørmum.

